# Skjótasta brotssparkið

Talan var um skjótasti brotssparkið í EM-søguni, tá Kroatia í gjárkvøldið vann 1-0 á Eysturríki. Longu eftir fýra minuttum varð Ivica Olic feldur, og tað metti dómarin vera brotsspark. Luca Modric umsetti hetta til einasta málið í dystinum, og so tykist Kroatia longu nú vera væl ávegis fjórðingsfinalunum í EM.



# Frei úti úr EM

Tárini fingu frítt at fara, tá Alexander Frei beint fyri hálvleik í setunardystinum noyddist av vøllinum. Í nærdysti snaraðist knæið hjá vandamikla áleyparanum, og alt bendir á, at hann ikki verður førur fyri at spæla hesu megin EM-endaspælið. Fyri Sveis var talan eisini um dyggan smeit. Frei er liðskipari hjá vertstjóðini, og hann er eisini maðurin, sum hevur skotið flest landsliðsmál í sveisiskari fótbóltssøgu. Onkur teirra eisini ímóti Føroyum.

# Podolski søkti sínar egnu

**- Eg havi tvey hjørtu, eitt týskt og eitt pólskt. Tí frøir sigurin meg ikki meira enn at vit fingu trý stig, sigur Lukas Podolski, týskur landsliðsframherji. Í gjár søkti hann sínar egnu, tá Týskland vann við tveimum málum móti ongum á Póllandi**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Fleiri undraðust, hví Lukas Podolski í tveimum førum ikki lat seg fagna sum málskjútta, tá Týskland sigraði á Póllandi í EM-endaspælinum í gjár. 23 ára gamli framherjin úr Bayern Munchen stóð fyri báðum málunum í 2-0 sigrinum.

Svarið er tó einfalt: Pólland er føðilandið hjá týska landsliðsframherjanum, og tað vóru tvær kenslubornar løtur, tá hann sendi framvið Artur Boruc.

- Eg havi tvey hjørtu, eitt týskt og eitt pólskt. Tí frøir sigurin meg ikki meira enn at vit fingu trý stig. Familjan er framvegis búðsitandi í Póllandi, segði Lukas Podolski millum annað á tíðindafundi eftir dystin.

## Gjøgnumbrotið

Lukas Podolski er sonur fyrrverandi pólska fótbóltsleikaran Waldemar Podolski. Sum tvey ára gamalur flutti Lukas við familjuni til Týsklands, har tey síðan fingu týskan ríkisborgarskap. Núverandi týski landsliðsleikarin vaks upp í Bergheim, sum liggur nær býnum Köln.

Í 1995 varð hann knýttur av ungdómsdeildini í FC Köln, har hann átta ár seinni fyrstu ferð fekk møguleikan á besta liðið felagsins.

18 ára gamli og tá ókendi Lukas Podolski gjørdi um seg alt fyri eitt, og 10 mál í 19 dystum borgaði eisini fyri góðsku. Hóast frálíku hagtølini hjá framherjanum, so flutti felagið niður í næstbestu deildina, sum hann var við til at skjóta upp aftur millum tey bestu árið eftir. Í alt skjeyt hann 46 mál í 81 dystum fyri felagið.

Í 2006 skifti Lukas Podolski til týska stórfelagið Bayern Muncehen. Upphæddin var 10 milliónir pund. Hóast Hamburg, Werder Bremen og Real Madrid eisini sýndu framherjanum áhuga, so valdi hann týsku meistararnar, har hann serliga hetta seinasta árið hevur hann torført við at vinna sær pláss í byrjunaruppstillingini.

## Landsliðið

Eftir fleiri sannførandi avrik fyri FC Köln fingu pólskir miðlar í 2003 eyguni upp fyri Podolski, og skjótt varð rátt táverandi pólska landsliðsvenjarnum, Pawel Janas, at fáa hann at spæla fyri Pólland.

- Vit hava fleiri frálíkar framherjar í Póllandi, og eg dugi ikki at síggja, at eg skal úttaka hann, tí hann hevur staðið seg væl í einum ella tveimum dystum í týsku landskappingini. Hann eigur framvegis ikki fast pláss á liðnum hjá Köln, var aftursvarið hjá Janas.

Podolski og liðfelgararnir flutti niður úr Bundesliguni, men týski landsliðsvenjarin Rüdi Völler bar skjótt at. 4. juni í 2004 var framherjin fyri fyrstu ferð í týska landsliðsbúnanum. Við málunum móti Póllandi í gjár, hevur hann hesi fýra árini skotið 27 mál í 49 dystum fyri Týskland.

### FAKTA

**Navn:** Lukas Podolski
**Føddur:** 4. juni, 1985
**Pláss:** Framherji
**Felag:** Bayern Munchen
Fyrrverandi feløg: 2003-2006, FC Köln



*Podolski er føddur í Póllandi, men húskið flutti til núverandi heimlandið, tá hann var tvey ára gamal. Tí var fagnaðurin ikki tann heilt stóri, tá hann við tveimum málum søkti vónirnar hjá føðilandinum*

*Mynd: Polfoto/AP*

### FAKTA um EM

**Sveis-Kekkia 0-1 (0-0)**
0-1: Vaclav Sverkos, 70.

**Portugal-Turkaland 2-0 (0-0)**
1-0: Pepe, 61.
2-0: Raul Meireles, 90.

**Eysturríki-Kekkia 0-1 (0-1)**
0-1: Luka Modric (br.), 4.

**Týskland-Pólland 2-0 (1-0)**
1-0: Lukas Podolski, 20.
2-0: Lukas Podolski, 72.

**Komandi dystir**

| | | |
|---|---|---|
| 09.06 | 17.00 | Rumenia-Frakland |
| 09.06 | 19.45 | Holland-Italia |
| 10.06 | 17.00 | Spania-Russland |
| 10.06 | 19.45 | Grikkaland-Svøríki |

# Havnargentur til HM

**Kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag, ið eru steypavinnarar og føroyameistarar í estetiskum fimleiki í 2008, fara komandi vikuskiftið, at luttaka í World Championship í estetiskum fimleiki**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Vónirnar eru, at liðið kann vinna seg í miðbólkin, nú kvinnurnar hjá Havnar Fimleikafelag gera fjórðu royndina í HM-kappingini í estetiskum fimleiki*

Kappingin verður í Toronto í Canada, og fara kvinnurnar avstað mikudagin 11. juni.

Kvinnurnar hava vant dúgliga síðan FM kappingina í mai og mánadagin verður seinasta venjingin og harvið seinastu rættingarnar lagdar tilrættis, áðrenn farið verður avstað.

Hetta er fjórða árið, at Havnar Fimleikafelag sendir kvinnuliðið til HB. Fyrstu ferðina varð kappingin hildin í Danmark, og síðani hava tær ferðast til Finnland, Spania og nú altso til Canada.

- Fyrstu ferð HF luttók, var fyri at vita hvar felagið lá í heimshøpi. Aðru ferð var fyri at vita um felagið hevði tikið seg fram og triðju ferð var roynt at koma upp í tann sokallaða miðbólkin. Tað gekk ikki tá liðið var í Spania í 2007, hóast stóra framgongd, men vónirnar eru har avgjørt hesaferð. Tað er púra vist, at felagið hevur ikki átt betur lið nakrantíð, verður sagt í tíðindaskrivi frá felagnum.

Til HM-kappingina er tað russiska Sonyia Glyzina, sum hevur staðið fyri koreografiini hjá liðnum.

Innleiðandi kappingin verður fríggjadagin klokkan 14 og sjálv finalan verður leygardagin klokkan 14.